# Vegleiðing
# til umsóknarblaðið

Feløg og einstaklingar, sum søkja stuðul frá MáF, antin tað so er til týðing, leik, skeið ella annað, verða at brúka umsóknarbløðini, sum liggja á heimasíðu MáF's.

**Søkt kann verða um stuðul hesar tíðir:**

1. 1. mars.
2. 1. juni.
3. 1. september.
4. 1. desember.

Stuðul verður ikki latin til tiltøk, sum longu eru farin í gongd ella sum longu hava verið.

Tá ið MáF játtar stuðul til leikuppseting, verða, um gjørligt, 40% av stuðlinum útgoldin, tá leikvenjingarnar byrja, 35%, tá ið framførslurnar eru byrjaðar, og 25%, tá ið MáF hevur fingið **fullfíggjaða uppstilling av inntøkum og útreiðslum, undirskrivað av formanni og kassameistara ella øðrum ábyrgdara. Hetta skal verða MáF í hendi í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at framførslurnar eru lidnar.**

**Felag, sum fær stuðul til leikuppseting, skal seta eitt fólk, sum hevur ábyrgd yvir fyri megin-felagnum.**

Stuðul til skeið og annað verður allur latin, so skjótt hann er játtaður. **Frágreiðing um skeiðið/tiltakið skal latast MáF í seinasta lagi 1 mánaða eftir skeiðs-/ tiltakslok.**

Tá MáF veitir stuðul til leikrit, eigur MáF rættindini til leikin.

Tað er umráðandi og lógarkravt í øllum førum, at **øll neyðug loyvi eru fingin** frá avvarðandi rættindahavara, **áðrenn farið verður undir at týða og/ella framføra ein og hvønn leik!** Støddin á avtalaða framførslugjaldinum verður sett í umsóknarblaðið. Til ber eisini at søkja um stuðul til hesa útreiðslu.

MÁF-skrivstovan hjálpir fegin við upplýsingum og vegleiðingum, tá ið ræður um at søkja um stuðul her og aðrastaðni.

Eru ivamál ella spurningar í sambandi við stuðulsumsóknina, eru tit altíð væl komin at seta tykkum í samband við skrivstovuna.

**Tórshavn, 1. mars 2006.**
**Malan Joensen**
**dagligur leiðari**